## Vesturskin virkar væl

**Toftir:** Í september mánaða 2004 tók Nes kommuna nýbygda eldrasambýlið Vesturskin í nýtslu, har pláss er fyri 16 búfólkum.

– Heimið hevur virkað væl og umframt fólk úr Nes kommunu, hava eisini fólk úr øðrum kommunum búð á heiminum í stytri tíðarskeið.

Tað sigur kommunan í samandrátti til ársroknskapin fyri 2005.

Umframt Vesturskin, hevur Nes kommuna saman við hinum kommununum í Eysturoy eisini víðkað Eysturoyar Røktar-og Ellisheim í Runavík við 24 búplássum.

— So, nú er tørvurin nøktaður, sigur kommunan.

Parturin hjá Nes kommunu av víðkanini av Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi er 544.000 krónur um árið í trý ár. **(-vilmund)**

## Kostar at pumpa

**Toftir:** – Tað kostar at pumpa vatn úr Toftavatni um summarið. Tí eiga øll at ansa eftir ikki at brúka vatn óneyðugt.

Tað sigur Nes kommuna.

Vatnnýtslan í kommununi er økt rættiliga nógv seinastu árini.

– Hóast vit hava bygt ein vatnbrunn aftrat á Svangaskarði - og vit hava stórar vatngoymslur við Kornvatni og báðum Hamravøtnunum, er hetta ikki nóg mikið um summarið.

Kommunan sigur, at neyðugt tí hevur verið um sumrarnar at pumpa vatn niðan úr Toftavatni fyri at nøkta tørvin.

– Pumpingin kostar pening, og tí mugu fólk ansa eftir ikki at brúka vatn óneyðugt, sigur Nes kommuna. **(-vilmund)**

# Útbyggja havnalagið fyri 8 miljónir krónur



– Virksemið á havnalagnum er saman við ... nevnd

**Við útbyggingini fær Nes kommuna 95 metrar av atløgusíðu aftrat. – Tað er alneyðugt at bøta um atløguviðurskiftini, nú so nógv virksemi er við havnalagið, sigur formaðurin í teknisku nevnd, Súni í Hjøllum**

ÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bygdaráðið í Nes kommunu hevur samtykt at útbyggja havnalagið á Toftum við 95 metrum av atløgusíðu. Atløgusíðan verður bygd frá ferjuleguni við Toftagjógv og norðureftir. Dýpið verður 7 og 8 metrar.

Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd í Nes kommunu, sigur, at kommunan hevur biðið um tilboð frá tveimum stórum byggifyritøkum, og úrslitið varð, at J&K Petersen fekk arbeiðið.

### Komandi summar

– Tá ið atløgusíðan er gjørd, og økið uppi á landi er gjørt liðugt við asfaltering og øðrum, fer kostnaðurin av arbeiðnum at liggja um einar 8 mió krónur.

Hann sigur, at byggingin ætlandi byrjar fyrsta dagin, og væntandi verður nýggja atløgusíðan klár at taka í nýtslu komandi summar.

– Tað er so nógv virksemið á havnalagnum, at alneyðugt er at bøta um umstøðurnar hjá vinnulívinum á Toftum. Vit mugu ásanna, at virksemið á havnalagnum saman við tí, sum verður forvunnið á sjónum, er høvuðsgrundarlagið fyri inntøkuni hjá kommununi, sigur Súni í Hjøllum.

### Skattainntøkan

Inntøkurnar hjá Nes kommunu hava verið góðar í ár.

– Vit mettu, at inntøkurnar fóru at vera 25,3 mió krónur, men nú árið er við at verða umliðið, bendir alt á, at talan verður um eina meirinntøku í ár upp á einar 2-3 mió krónur, sigur hann.

Inntøkurnar hjá Nes kommunu fyri komandi ár verða helst einar 28,2 mió krónur.

– Skattaprosentið fyri 2007 verður tað sama sum í ár, 20,5%, og barnafrádrátturin verður eisini hin sami, 4.500 krónur fyri hvørt barnið, sigur Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd, sum eisini er varaborgarstjóri.

# Skúlabyggingin gongur eftir ætlan



– Skúlabyggingin gongur væl, og ætlandi ver›ur ein partur av nýggja skúlanum tøkur eftir summarfrítí›ina í 2007, sigur Súni í Hjøllum

Mynd: Vilmund Jacobsen

SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nes kommuna hevur eina stóra verkætlan í gerð, sum er útbyggingin av skúlanum. Hetta er eitt rættiliga umfatandi arbeiði, sum er mett at kosta einar 43-44 mió krónur.

### Læna pening

Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd, sigur, at kommunan hevur verið skuldarfrí, men í samband við skúlavíðkanina hevur verið neyðugt at taka 25 mió krónur í láni.

– Skúlabyggingin gongur eftir ætlan, bæði hvat viðvíkur kostnaði og tíðarætlan.

Hann sigur, at skúlavíðkanin verður liðug á vári 2008, men at ein partur av nýggja skúlanum eftir ætlan verður tøkur eftir summarfrítíðina í 2007.

### Neyðug stýring

Súni í Hjøllum leggur dent á, hvussu neyðugt tað er, at kommunan stýrir fíggjarútreiðslunum.

– Vit mugu ikki tyngja kommununa við ov stórum lánum, so rentubyrðan gerst ov stór. Inntøkur og útreiðslur mugu fylgjast, sigur formaðurin í teknisku nevnd avgjørdur.

# 800 fólk sku...

**– Síðani Høganesætlanin kom fram í fjølmiðlunum, eru fyrispurningarnir um byggiøki øktir munandi. Somuleiðis hevur tunnilsætlanin eisini økt um áhugan hjá fólki at fáa grundstykki í Nes kommunu, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri**

HØGANESÆTLANIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var rættiliga stórur áhugi, tá ið Nes kommuna legði stóru Høganesætlanina fram fyri almenninginum á Svangaskarði í síðsta mánaða.